# Samskip minkar siglingingina til Íslands

Innflutningurin til Íslands er minkaður munandi, nú búskaparkreppa merkir landið. Av tí hevur Samskip endurskoðað siglingarætlanina. Framyvir fara trý skip at røkja rutuna til og frá Íslandi og Føroyum í mun til verandi fýra skip. Akrafell verður tikin úr rutuni á Føroyar/Íslands leiðini og fer í rutu aðrastaðni. Hvassafell heldur fram við rutuni Reyðarfjørður, Kollafjørður, Rotterdam og Immingham, men fer ikki á Reykjavík. Hetta merkir, at Hvassafell fer av Kollafirði 9. hvønn dag.Rutan hjá Arnarfell og Helgafell er óbroytt og fara teir framhaldandi, at sigla vikuliga millum Reykjavík, Grundartanga, Vestmannaoyggjarnar, Immingham í Bretlandi, Rotterdam í Hollandi, Cuxhaven í Týsklandi, Varberg í Svøríki, Aarhus í Danmark og Kollafjørð. - Við hesari broyting hevur Samskip lagað siglingarætlanina og felagið, í mun til nýggju fortreytirnar á Íslendska marknaðinum, sigur Joel undir Leitinum, stjóri á Samskipum í Føroyum.





*Rúni M. Hansen, stjóri í StatoilHydro í Føroyum her saman við stjóranum á Jarðfeingi, Petur Joensen*



*Geysir Petroleum við umsókn til Jarðfeingi*



*Faroe Petroleum við umsókn til Jarðfeingi*

## 1. loyvisumfar 2000



Fyrsta loyvisumfar á føroyska landgrunninum lat aftur 17. mai 2000. Tá komu inn 23 umsóknir umboðandi 17 feløg. Tíðindaskrivið frá Oljufyrisitingini varð soljóðandi:

Á middegi í dag var freistin at handa umsóknir um leitiloyvi í fyrsta loyvisumfarinum á føroyska landgrunninum úti. Tá hevði Oljumálastýrið móttikið 23 umsóknir frá 17 feløgum. Talan er bæði um umsóknir til loyvi við 6 ára og 9 ára leitiskeiðum.

"Eg eri væl nøgdur við talið av umsóknum. Sjálvt um oljufeløgini hava víst føroyska økinum stóran áhuga tey seinastu árini, er tað altíð ringt at meta um, hvussu nógv feløg fara at søkja, tá talan er um eitt heilt nýtt øki. Tað er ein spennandi tíð, sum nú liggur fyri framman, og mín vón er, at leitivirksemið fer at føra til oljuframleiðslu á føroyska landgrunninum, soleiðis at vit í framtíðini fáa eina nýggja og sterka vinnu øllum samfelagnum at gagni", sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum.

Fyrsta loyvisumfar varð latið upp 17. februar í ár. Økið, sum er boðið út, liggur eystan fyri og í ein landssynning úr Føroyum og er um 14.000 ferkilometrar til støddar. Økið er býtt upp í 56 heilar teigar og 26 partteigar. Umsóknirnar, ið eru komnar inn í hesum umfarinum, fevna um umleið eina helvt av útbjóðaða økinum.

Oljufeløgini, sum hava søkt um leitiloyvi á føroyska landgrunninum eru:

- Agip
- Amerada Hess
- Anadarko
- Atlants Kolvetni
- BP Amoco
- British Gas
- Conoco
- Dong
- Enterprise
- Føroya Kolvetni
- Marathon
- Murphy
- Norsk Hydro
- Phillips
- Statoil
- Texaco
- Veba

Oljumálastýrið miðar móti at veita loyvini í september 2000.

## 2. loyvisumfar 2004



Annað útbjóðingarumfar í føroyskum øki lat aftur 17. nov. 2004. Tá komu inn 9 umsóknir umboðandi 8 feløg. Tíðindaskrivið frá Oljufyrisitingini varð soljóðandi:

Á middegi í dag var seinasta freist hjá oljufeløgum at handa inn umsóknir um leitiloyvi í øðrum útbjóðingarumfarinum á føroyska landgrunninum. Oljufyrisitingin hevur móttikið 9 umsóknir frá 5 samtøkum ella einstøkum feløgum. Tilsamans 8 feløg mynda umsóknirnar

- Eg eri nøgdur við talið av umsóknum. Tað er partur av okkara framtíðar leitiætlan at flyta virksemið longur inn á landgrunnin, á øki har leitimiðini eru fjald av basaltfláum. Hetta er eitt tøkniliga avbjóðandi øki, og tí eru vit fegin um, at feløgini, sum í dag hava latið inn umsóknir, í stóran mun eru feløg, ið eru virkin á bæði føroyska og bretska partinum av Atlantsmótinum.

Mín vón er, at arbeiðið, ið verður sett í verk, sum úrslit av øðrum útbjóðingarumfari, fer at fáa nýggja vitan til vega og skapa grundarlag fyri at finna kolvetni í rakstrarverdum nøgdum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Annað loyvisumfar lat upp 17. august í ár. Útboðsøkið er um 19.000 ferkilometrar til støddar. Økið er býtt upp í 83 heilar teigar og 39 part teigar. Størri parturin av útboðsøkinum liggur í ein eystan og landsynning úr Føroyum, meðan tvey minni øki liggja í ein útsynning sunnan.

Oljufeløgini, sum hava søkt um leitiloyvi í hesum útbjóðingarumfarinum, eru:

- Atlants Kolvetni
- Chevron Texaco
- Dong
- Føroya Kolvetni
- Geysir Petroleum
- OMV
- Shell
- Statoil

Av hesum eru Chevron Texaco, Geysir Petroleum og OMV nýggj feløg á føroyska landgrunninum.

Miðað verður ímóti at veita loyvini skjótast til ber.

## 3. loyvisumfar 2008



Triðja útbjóðingarumfar til oljuleiting í føroyskum øki lat aftur mánadagin 3. November 2008. Inn komu 3 umsóknir umboðandi 5 feløg. Tíðindakrivið frá Jarðfeingi varð soljóðandi:

Tann 11. juli 2008 varð 3. útbjóðingarumfar til kolvetnisleiting latið upp, og freistin at lata inn umsóknir var úti á middegi í dag. Jarðfeingi hevur móttikið tríggjar umsóknir frá tilsamans fimm feløgum.

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur: - "Vit høvdu kanska vónað at fáa fleiri enn tríggjar umsóknir, men vit fegnast um, at feløg við stórum kunnleika til føroyska økið framhaldandi síggja møguleikar her. Nógv leitivirksemi er í teimum verandi 11 loyvunum, og við loyvunum, sum nú væntandi verða latin, verður virksemið økt og samstundis víðkað til nýggj øki. Tað er mín vón at hetta virksemið førir til, at kolvetni verða funnin í rakstrarverdum nøgdum, soleiðis at Føroyar búskaparliga fáa fleiri bein at standa á ."

Miðað verður ímóti at avgreiða umsóknirnar í hesum árinum.

Feløgini, ið søkt hava, eru:

- Atlantic Petroleum
- DONG Energy
- Føroya Kolvetni
- GeysirPetroleum
- StatoilHydro